**Skrivligur fyrispurningur**
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

**Svarari:** Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum

**Evni:** Veðurstova Føroya

**Spurningar:**

1. Nær er endalig avgerð tikin um at staðseta Veðurstovu Føroya í Havn?
2. Er ætlanin at leggja Veðurstovu Føroya aðrastaðni, antin í Klaksvík ella á Flogvøllinum

**Viðmerkingar:**
Tað er at fegnast um, at arbeiðið við Veðurstovu Føroya nú er komið so langt, at søkt verður eftir veðurfrøðingum.
Men sambært starvslýsingini stendur, at høvuðsdeild og vaktarstova verður á veðurstøðini við Boðanes, Tórshavn.

3. nov í fjør segði landsstýrismaðurin annars í svari til undirritaðu, at støða ikki varð tikin til, hvar veðurstovnurin skuldi liggja.

Fyri at fáa greiðu á hesum viðurskiftum verður hesin fyrispurningur settur landsstýrismanninum.

**Á Løgtingi, 14. apríl 2021**

Beinta Løwe Jacobsen